# Jólakonsertin 2005 í Christianskirkjuni



*Í ár verða tað Stanley Samuelsen og Arnfríð Lützen, sum saman við hornblásarum hava konsert í Christianskirkjuni*

**Sunnukvøldið verður jólakonsert við Stanley Samuelsen, Arnfríð Lützen og horntónleiki í Christianskirkjuni**

Nú jólini eru í hondum, er bara eftir at fara til árligu jólakonsertina í Christianskirkjuni. Í ár hevur Klaksvíkar Hornorkestur, sum hevur skipað fyri konsertini í mong ár, fingið fløguaktuella Stanley Samuelsen úr Fuglafirði, at føra fram. Eisini fer Arnfríð Lützen, songkvinna, at syngja jólasangir.

Klaksvíkar Hornorkestur og Ungdómshornorkestrið seta sjálvsagt sín dám á løtuna við kendum jólaløgum. Talan er bæði um gomul løg, sum verða framførd soleiðis, sum vit øll kenna tey, og so eisini kend løg, ið hava fingið nýggjan ham.

Konsertin, sum altíð er væl vitjað, verður sunnukvøldið 18. desember kl. 20:00.

**-ave**

## Høvundar og tónleikur í Leikalund

**Leygarkvøldið er høvi at hitta rithøvundarnar Carl Johan Jensen og Jóanes Nielsen, tá teir fara at signera sínar nýggju bøkur í Leikalund. Eisini fer fløguaktuelli Stanley Samuelsen at spæla nøkur løg**

**MENTAN**

Jólahýrurin í Leikalund heldur fram við ymsum forvitnisligum tiltøkum nú upp undir jól. Nú fríggjadagin kl 17.00, fara Sólgerð Færø og Hanna Steinberg frá Musikkskúlanum at spæla nøkur jólaløg á floytu.

Fløguaktuelli Stanley Samuelsen, er komin til Føroyar at vitja, og leggur hann leiðina fram við Leikalund leygarkvøldið har hann fer at syngja og spæla nøkur løg.

Eisini koma Carl Johan Jensen og Jóanes Nielsen á gátt leygarkvøldið, tá teir fara at signera og siga nøkur orð, um sínar nýggju bøkur, "Ó - søgur um djevulskap" og "Glansbílætasamlararnir".

Tiltakið leygarkvøldið byrjar kl 19.00, øll eru vælkomin og vónandi møta fólk fjølment.

**ave**





